Cross-Bikers MC Føroyar:

# Holy Riders MC Føroyar skift navn

**Á ársaðafundi í februar mánað og limafundi fyrst í mars mánað í ár, varð avgerð tikin um, at gera verandi MC-felag um til eitt lokalt, føroyskt MC-felag við øðrum navni eisini**

TÍÐINDASKRIV



Nýggja navnið er: “Cross-Bikers MC Føroyar”, og varð eisini nýggj nevnd vald á aðalfundinum at taka sær av felagnum. Nevndin hevur ikki skipað seg enn, men samtykt var, at verandi leiðarin Victor Carlsen, í høvuðsheitunum kemur at taka sær av at leiða nýggja felagið frameftir.

Cross-Bikers MC Føroyar er ein falagsskapur í arbeiðir á tvørkirkjuligum grundarlag, og erinhvør, ið játtar Kristus sum Harra, vælkomin at gerast limur. Limagjaldið er ásett at verða 400,- kr. um árið fyri stakar persónar og 600,- kr. um árið fyri pør.

Góða samstarvið, sum hevur verið við Holy Riders í Norra kemur sjálvsagt at halda fram. Eisini verður nýggja, føryska felagið lagt undir altjóða felagsskapin, kallaður “Biker Church”, sum samskipar allar kristiligar MC-felagsskapir, fyri tað mesta í Europa.

### Nýggj heimasíða

Sum eitt neyðugt samskiftislið, hevur felagið fingið egna heimasíðu á alnetinum, og finnist henda á: www. cross-bikers.com , ein heimasíða sum spakuliga fer at verða bygd upp við øllum upplýsandi um felagið og virksemið annars. Eisini verða upplýsingar at finna um aðrar kristiligar mc-felagsskapir, eins og myndir frá tiltøkum fara eisini at verða vístar.

### MC-Dagur í Vágum.

Tað fyrsta tiltakið, sum nýggja felagið fer at skipa fyri, er leygardagin 26. mai, ein sokallaður MC-Dagur í Vágum, har hesin fer at verða hildin í Missónshúsinum “Libanon” í Sørvági. Samkoman har bakkar tiltakinum 100% upp við øllum praktiskum stuðli. Á skránni verður Grill-Party, felagskoyring runt Vágoynna, MC-spøl og –kappingar. Kl. 18.00 verður náttverði fyri mc-koyrarunum, og kl. 19.30 verður ein Gospelkonsert hildin í salinum kl. 19.30, har 3 luttakandi bólkar vera at hoyra. Øll eru hjartliga vælkomin at vera við, og tiltakið er ókeypis.

Sjálvt tiltakið byrjar kl. 13.30 og endar tiltakið, tá konsertin er liðug við einum drekkamunni. Øll MC-feløgini í Føroyum hava fingið eina meira nágreiniliga skrá at ganga eftir í samband við koyringina vestur.

BKV v.Terja Dalsgaard:

# Nú lata vit upp á meginøkinum

**Bókhald- og roknskaparstovan BKV v.Terja Dalsgaard læt upp skrivstovu á Argjaboðagøta 7 á Argjum týsdagin 24. apríl**

TÍÐINDASKRIV



*Terji Dalsgaard, stjóri á BKV*

BKV er ein sjálvstøðugt roknskaparstova, sum eisini fæst við ognarmekling, ið setir ynski kundans og vegleiðing fremst, tá ið tað snýr seg um roknskapartænastur, og at selja sethús, bátar, bilar v.m. Eitt fólk burturav kemur at taka sær av ognarmeklingarvirkseminum.

Fyrstu tíðina verður BKV-skrivstovan á Argjum opin týsdagar og hósdagar frá kl. 09.00 til 16.30, men málið er, at opið verður allar arbeiðsdagar frá kl. 09.00 til 16.30. Vit hava tó telefontíð allar vikudagar. Vit eru at hitta á telefon 219376, 361376 og telefax 361309 og á teldupostadressuni bkv@post.olivant.fo

Á heimasíðu okkara, www.bkv.fo lýsa vit nærri okkara virksemið.

Heimasíðan hja BKV er kanska eitt sindur øðrvísi enn hjá øðrum virkjum, tí hon hevur ein tíðindaportal við tíðindum úr Sandoy, Íslandi, Hetlandi og oyggjunum sunnanfyri. Trý fólk eru, sum síggja til, at portalurin altíð verður dagførdur. Heimasíða okkara er rættiliga væl vitjandi, og er skrásett hjá Gallup Føroyar

Í ár eru tað 23 ár síðani BKV varð stovnað á Sandi. Virksemið í Sandoynni heldur fram við somu upplatingartíðum; mánadag til fríggjadag kl. 08.00 til 17.00.



*BKV v.Terja Dalsgaard hevur latið upp skrivstovu á Argjaboðagøtu 7*

## Andlát og jarðarferðir

**Karolina Berg**, vanliga nevnd Linnebeth, ættað av Toftum, búsitandi í Tórshavn andaðist á Gerðisgarði í Skálavík leygardagin 12. mai, 84 ára gomul. Kistan kemur heim í Ebenezer týskvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Ebeneser mikudagin kl. 14.00

**Elisa Larsen**, fødd Mikkelsen, Tórshavn, fer til gravar frá Østre kirkegårdskapel í Ålborg mikudagin 16. mai klokkan 11. Tey, sum vilja minnast Lisu, kunnu lata eina peningagávu til Skovbrynet, Bøgen Roden 18. Spar Nord Bank, Registreringsnummar: 9035 Kontonummar: 45.68.94.81.36.

**Heini Hansen, Hoyvík**, ættaður úr Sandavági, andaðist mánadagin 14. mai, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Margretha Weihe**
ættað av Nesi,
búsitandi í sambýlinum Gøtubrá

doyði og varð jarðað.
Takk til prestarnar, tulk, kirkjutænarar og fyri tann vakra sangin og tykkum, sum stóðu fyri ervinum.
Tøkk til Gøtubrá, heimarøktina og tykkum, sum vitjaðu, ringdu og skrivaðu.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Gamlagerði.
Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ruth, Jóhan og Marjun**

**Dagurin**

**16.mai eitur Sára.** Dagurin hevur navn eftir konu Ábrahams. Hebraiska navnið merkir *høvdingafrú*.
Í Írlandi verður dagurin hildin til minnis um munkin **Sankta Brandan**, sum doyði í árinum 578. Tiltikin gjørdist hann av frásøgnunum um sjóferðir sínar, og hann fekk eisini navnið *Navigator*, ið júst mekir sjófari ella siglingarmaður. Hann og felagar hansara løgdu avstað at leita eftir tí lovaða landinum, og hildið verður, at teir komu líka til Norðuramerika. Sagt verður frá, at Brandan á ferðum sínum kom til Seyðaoyggjarnar, sum uttan iva eru Føroyar. Í Kirkjubø er ein Brandansvík, og í Skálavík hava vit staðarnøvnini Brandansbrekka og Brandansjørð.
Í Kirkjubø varð um 1420 bygt eitt minniskapell fyri Sankta Brandan. Hann er fyrsti navnnevndi maður, ið her hevur verið, men um eina brandansmessu eææa ein brandansdag hjá okkum vita vit einki at siga.